









*Í Baðilandinum í Lalandia er rættiligt tropiskt veðurlag: Vatnið er 28 stig og luftin er 30 stig heit. Pláss er fyri 1.300 fólkum inni í senn*

# Tað er altíð gott veður í Lalandia

FAMILJUFERÐ

Skalt tú halda frí saman við familjuni í barnavinarligum umhvørvi, ja so er Lalandia staðið. Lalandia, frítíðarmiðstøðin á Lollandi, hevur alt, sum barnafamiljuni tørvar. Har er stórt baðiland og ein rúgva av avbjóðingum til øll í familjuni. Sjálvt sentrið er 25.000 fermetrar – alt undir taki, so har ber til at njóta lívið í øllum veðri.

Í Lalandia er tískil altíð gott veður, sum sagt verður í lýsingunum.

Endamálið við Lalandia er at geva barnafamiljunum møguleika at halda frí ella taka ein steðg frá gerandisdegnum við frælsi at velja millum eitt fjølbroytt útboð av upplivilsum í einum umhvørvi, sum ikki er treytað av veðri.

Í Lalandia búgva gestirnir í teimum 741 frítíðarhúsunum, sum liggja kring sjálvt sentrið. Visiónin er, at Lalandia skal vera tann einastandandi møguleikin hjá barnafamiljunum at halda stutttíðar feriu í Danmark.

## Baðilandið

Tað, sum Lalandia er mest kent fyri er Baðilandið, sum er tað største av sínum slag í Danmark. Har vitja umleið 750.000 gestir hvørt ár. Baðilandið er 7.400 fermetrar til víddar, og er bæði fyri stór og smá.

Í baðilandinum eru tríggir stórir svimjihylar við nógvum plássi til at svimja, spæla ymisk vatnspøl og undirhald. Har eru fýra boblubað og fýra villir rutchebanar. Harafturat eru tveir stórir barnahylar við serliga heitum vatni, vatnrutchebana og spælidýrum. Eisini eru hitarúm og seks sólir til fría nýtslu.

Vatnið í baðilandinum er 28 stig heitt og luftin er 30 stig. Sostatt er talan um tropiskan hita. Ein aldumaskina elvir til, at tú kennir teg sum á strondini – og suðurlendsku pálmarnir fáa huglagið rættiliga út at sveima.

Síðsta skotið hjá baðilandinum er víðkanin við einum uttandura baðilandi, sum verður liðugt í juni í ár. Umbyggingin snýr seg eisini um ein uttandura "wild river" vatnrutchebana. Harafturat verður ein oasa við 300 fermetrum uttandura hylum við boblubonkum og einum grønum øki. Uttandura hylarnar kanst tú vitja samstundis sum innandura baðilandið. Tú kanst eisini vitja uttandurabaðilandið árið runt, tí vatnið verður hitað við yvirskotshitanum frá skoytuhøllini – har framleiðslan av kuldanum skapar nógvan hita. Staðið fara tey at rópa "Lollands Blå Lagune".

## Frítíðarhúsini

Tað eru tilsamans 741 frítíðarhús, sum til ber at leiga. Har er pláss fyri tilsamans umleið 4.000 gestum í senn.

Tað eru privat fólk sum eiga frítíðarhúsini, sum verða leigað Lalandia. Húsini eru alla tíðina undir eftirliti av Lalandia, til tess at varðveita góskustøðið. Er okkurt hús, sum ikki lýkur krøvini, so verður tað tikið frá leigumøguleikanum.

Tað eru frítíðarhús til einhvønn tørv. Felags fyri øll er tann hugnaligi og funktionella innrættingin. Húsini eru praktist innrættað. Har eru spísiborð, sofagruppa, satelitt sjónvarp, franskur køkur við køliskapi, komfýri/plátum og mikroovni. Baðirúmini hava brúsu. Húsini hava egna terassu beint út til grønt øki við spæliplássum, ítróttaraktivitetum, og tær grønu plenurnar eru bæði góðar til leik og hugna. Síðani 2003 hevur Lalandia leigað út 68 luksus frítíðarhús við egnari sauna og spapoolum. Í 2005 komu enn 38 slík hús.

Lalandina leigar út frítíðarhús við møguleikum hjá ávikavist trimum, fýra, fimm, seks ella átta fólkum. Serlig ynski og tørvur, sum eitt nú serlig hús til brekað, sum ikki hýsa húsdjórum, roykfrí og so framvegis kann avtalast, tá uppihaldið verður bílagt.

Tá tú leigar teg inn í frítíðarhús í Lalandia, so ført tú samstundis ókeyps atgongd til Baðilandið, til Monkey Tonky Land, barnaundirhald og ført ókeypis reingerðing við fráferð. Øll fáa eisini ein tur/returferðaseðil við Scandlines til Puttgarden, har til ber at vitja í tí stóru Border Shopini.

*Lagt til rættis: Eirikur Lindenskov*